# Nú má løgmaður taka um endan á Karsten og Ellinti

VERKFALLIÐ
*Áki Bertholdsen*



– Hetta gongur ikki longur. Nú má løgmaður taka um endan.

Henrik Old, løgtingsmaður fyri Suðuroynna heitir nú á Anfinn Kallsberg, løgmann um at loysa verkfallið, sum leggur ein part av landinum lamnan.

Hann sigur, at løgmaður kann heilt einfalt ikki longur látast sum onki ímeðan verkfallið hjá Skipara- og Navigatørfelagnum er í ferð við at knúsa allan útjaðaran í Føroyum, sum hann málber seg.

– Løgmaður hevur evstu ábyrgdina av, at samfelagið virkar og tí noyðist hann at lata við seg koma.

Henrik Old sigur, at støðan hjá útjaðaranum er farin út um alt mark og tí noyðist løgmaður at taka stig til at fáa ein enda á verkfallinum.

– Løgmaður eigur beinanvegin at heita á semingsfólkini um at kalla partarnar aftur til samráðingarborðið. Samstundis eigur hann at geva Karsten Hansen beinleiðis harraboð um at fáa málið loyst, og at tola, at tað kostar nakrar krónur.

– Tá ið Lønardeildin og landsstýrismaðurin ikki megna at loysa trupulleikan, má Løgmaður taka um endan.

Nú er tað bara hann, sum kann loysa málið, tað er Løgmaður sjálvur og tað eigur hann at gera. Letur hann framvegis ikki við seg koma, er tað ábyrgdarleyst av honum.

*– Hetta er ein innlig áheitan á Anfinn Kallsberg, Løgmann, um at fáa ein enda á verkfallinum beinanvegin, tí hann er tann einasti, sum kann gera tað, sigur Henrik Old, løgtingsmaður*

Løgtingsmaðurin vísir á, at tað, sum málið snýr seg um, er nakrar túsund krónur í løn um mánaðin til nakrar fáar mans.

Og hann samstundis, at yvirmenninir við Vaktar- og Bjargingartænastuni og Strandferðsluni, eiga at fáa eina góða løn.

– Tað líkist ongum, at tað eru fleiri av manningini á Smyrli, sum fáa hægri løn enn skiparin, men soleiðis er støðan, tí hann fær onga yvirtíð, sama, hvussu nógv hann siglur.

– Hetta eru menn, sum hava eina servitan og eina ábyrgd, sum ongin annar í landinum hevur. Yvirmenninir á Smyrli hava ábyrgdina av fleiri hundrað fólkum hvønn einasta dag.

– Hendir ein vanlukka, er tað endin á einum heilum landsparti. Teir kenna hvønn strong og hvørja íðu á leiðini, og tí eru teir førir fyri at føra fólk trygt um Suðuroyarfjørð, eisini í ringum veðri. Og tað ger teir til serfrøðingar, sum tað ikki eru fleiri av, og sum eru ringir at fáa aftur.

– Tað sama ger seg galdandi við teimum, sum sigla við Vaktar- og Bjargingartænastuni. Teir hava eitt arbeiði, sum mangan er ótespuligt og teir skulu viðhvørt leggja til havs í veðri, sum fær øll onnur skip at leita sær í havn.

– Tí hevur tað ómetaligan týdning fyri trygdina, at hesir menninir fáa eina løn, sum ger, at teir vilja vera umborð.

### Varandi loysn

Henrik Old sigur, at tað somuleiðis er neyðugt at finna eina varandi loysn.

– Tað kann vera, at onkur finnur fragd í at vinna ein sigur á Skipara- og Navigatørfelagnum. Men tað loysir bara trupulleikan til næsta ár, tá verður sama skilið aftur.

– Tí er tað neyðugt at finna eina varandi loysn og at leggja lønina á eitt støði, sum sømir seg. Tá ið Lønin er komin har upp, kunnu vit tosa um at gera teir til tænastumenn, men tað kann ikki gerast, fyrrenn lønin er komin upp á eitt hóskandi støði fyrst, sigur Henrik Old.

Henrik Old sigur, at verkføllini hesi seinastu árini eru størsta afturstigið, sum útjaðarin hevur verið fyri nakrantíð, tað er líka við at vera verri enn kreppan.

– Tosað verður um at fáa fólk at búsetast í útjaðaranum, men hvør skal búsetast í einum øki, sum liggur avbyrgt fleiri vikur um árið?

Hann minnir á, at útjaðarin er tann parturin í landinum, sum framaleiðir ein stóran part av okkara útflutningi.

– Nú liggja virkini still og noyðast at brúka tað mesta av árinum at vinna missin innaftur og fólkið gongur hendur í lumma. Tí er hetta eitt verkfall, sum kostar samfelagnum ein hóp av peningi.

Vit fingu ikki orðið á Løgmann, áðrenn blaðið fór til prentingar.

# Nú skulu Føroyar lammast á miðjuni

**– Hetta gongur ikki longur. Føst ikki ein endi á verkfallinum nú, fer Henrik Old at taka stig til at seta blokadu í verk ímóti Havnina**

VERKFALLIÐ
*Áki Bertholdsen*

– Tekur løgmaður sær ikki um reiggj nú, mugu stig takast til at leggja Havnina og miðstaðarøkið í Føroyum lamið.

Henrik Old, Løgtingsmaður fyri Suðuroynna, sigur at verkfallið kann ikki góðtakast longri.

Sum hann vísir á aðrastaðni í blaðnum, heldur hann, at Anfinn Kallsberg er tann einasti, sum nú kann fáa ein skjótan enda á verkfallinum.

– At leggja málið fyri tingið tekur fyri tað fyrsta langa tíð, og tað er heldur ikki rætti mátin. Skal tingiå loysa málið tekur tað allan mai mánað, men tað loysir bara trupulleikan til næsta ár. Tí má Løgmaður taka um endan, so at ein varandi loysn fæst.

### Blokera Havnina

Henrik Old sigur, at fæst ikki ein loysn á verkfallinum nú, verður tað neyðugt hjá fólki í útjaðaranum at taka onnur stig, tí hetta kann ikki ganga longri.

– Fólk hava stóran ampa av verkfallinum og tað er eitt álvarsligt bakkast fyri vinnuna. Tí verður tað neyðugt at vit fara til verka og vísa, at vit góðtaka ikki støðuna longri.

Løgtingsmaðurin sigur, at fæst ikki ein loysn nú, mælir hann til, at tey, sum búgva í útjaðaranum taka seg saman í felag og fara til Havnar at blokera.

– Tað verður neyðugt at lamma Føroyar á miðjuni fyri at fáa fólk at skilja álvaran. Tað gongur ikki, at



útjaðarin, sum hevur tað mesta av allari framleiðsluni, skal bløða í hel ímeðan alt gongur sína vanligu gongd í miðstaðarøkinum.

Hann sigur, at um neyðugt, fer hann sjálvur at taka stig til eina mótmælisferð til Havnar, endar verkfallið ikki nú.

– Eg fari at royna at savna allar góðar kreftir í útjaðranum og at fáa øll til Havnar at blokera. Ein máti kundi verið. at fingið øll fiskiskip og onnur skip at blokara innsiglingina til Havnar og at blokera alla Havnina. Og kanska eisini at byrgja vegin í Kaldbaksbotni, ella onkra aðrastaðni, av.

– Hetta má fáa ein enda. Nú mugu vágafólk, sandoyingar og norðoyingar og øll hini í útjaðaranum siga, at nú er nóg mikið. Skal samfelagið fara, er tað betri at alt fer og ikki bara útjaðarin.



# Mentanarhús í Runavíkar Kommunu

**Flaggdagin varð stovnandi aðalfundur hildin í Runavík, har felag varð stovnað, sum skal arbeiða fyri at byggja mentanarhús í Runavíkar Kommunu**

MENTANARHÚS
*Edvard Joensen*

**Runavík:** Arbeitt verður við ætlanum um at byggja eitt nýtt mentanarhús í Runavíkar Kommunu. Felag til endamálið varð stovnað flaggdagin.

Ætlaninar um at byggja mentanarhús í Runavík eru ikki nýggjar, greiðir ein av nevndarlimunum í nýggja felagnum, Kenneth Rasmussen, frá. Fundurin flaggdagin var í grundini ein fundur til endurstovnan av felagnum »Bygdarhús«, sum varð stovnað í 1975 og virkaði fram til 1982.

Runavíkar Kommuna hevur saman við onkrum av teimum, sum vóru virkin í gamla felagnum, skundað undir at fáa reist nýggja felagið.

Komandi mentanarhúsið í Runavíkar Kommunu skal vera eitt hús, sum brúkast kann til øll endamál, sigur



*Kenneth Rasmussen, nevndarlimur í felagnum »Bygdarhús«, heldur, at skipast skal fyri eini navna- og búmerkjakapping*

*Mynd: Edvard Joensen*

Kenneth Rasmussen. Tað skal vera til fólk í øllum aldri. Heilt frá smáu børnunum upp til pensionistarnar.

– Eitt hús, sum skal brúkast og vera livandi, sigur Kennth Rasmussen.

Ein arbeiðsbólkur skal setast at fyrireika eina byggiætlan, eins og kostnaðarmeting skal gerast, sigur hann. Enn er einki konkret á borðinum í so máta.

Gamla felagið eigur pening standandi frá tíðini, tað virkaði. Tann peningurin verður fluttur til endurstovnaða felagið. Tað er so mikið, at tað ger heilt góðan mun, sigur Kenneth Rasmussen, og farið kundi helst verið undir at bygt við tí, heldur hann.

Kenneth Rasmussen heldur ikki, at tað at byggja eitt mentanarhús í Runavíkar Kommunu nú, fer at skaða aðrar líknandi ætlanir í Eysturoy. Og í kommununi eru eingi møguleikar soleiðis, sigur hann.

Tað, sum liggur næst hesum húsinum, er nýggja kappróðrarneystið Inni á Bakka, men tað er mest sum eitt veitsluhøli burturav.

Hetta nýggja mentanarhúsið skal kunna brúkast bæði til konsertir og dans, eins og fyrilestrar og barnaansing.

Serliga verður hugsað um ungdómin, sigur Kenneth Rasmussen. Í dag er tað soleiðis, at fólk koyra til Havnar at dansa, tí einki dansistað er í kommununi.

Ætlanin er at fara undir ymisk tiltøk beinanveg, nú felagið er stovnað. Ætlandi verður farið undir at fyrireika eitthvørt at hava á Skálafjarðarastevnuni í summar.

– Men har mugu vit ansa eftir ikki at fara undir nakað, sum onnur longu eru inni á, sigur Kenneth Rasmussen.

Hann sigur, at tey fara at royna at fáa vinnuna í Runavík at stuðla hesum húsinum, eins og fók kunnu tekna seg sum lim í felagnum. Til ber at tekna seg sum einstaklingur, sum familja, eins og tað ber til hjá fyritøkum at tekna seg sum lim í felagnum »Bygdarhús«.

Kenneth Rasmussen heldur ikki, at navnið, brúkt verður, er so heppið. Tað er ein leivd frá gomlu tíðini, men nógv vatn er runnið hesi 20 árini, síðan felagið varð niðurlagt. Og Runavík er ikki longur nøkur bygd.

So hann heldur, at hóskandi hevði verið at havt eina navna- búmerkjakapping.

Nevndin, sum vald varð á fundinum flaggdagin, er mannað av Kára Thorsteinssyni, Eyðuni Gaardbo, Sólrun Jónson, Hansi Tausen og Kennethi Rasmussen.

# Ketil við bryggju í Runavík

**Nýggi ferðamannabáturin, sum AWI Boats í Runavík hevur gjørt til Grønlands, er flotaður og eitur Ketil**

BÁTASMÍÐ
*Edvard Joensen*



*Nýggi ferðamannabáturin til Nanortalik, Ketil, lá við bryggju í Runavík í gjár*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Runavík:** Ketil er 35 føtur til longdar, innilokaður og hevur tveir motorar, sum geva honum eina ferð upp á umleið 20 míl.

Skrokkurin á nýggja bátinum er tann sami, sum á nýggja AWI Star 35 útróðrarbátinum »Tvíburðar« sum latin varð í seinastu viku.

Ketil er gjørdur til grønlendska felagið Nanortalik Tourist Boats, sum skal nýta hann at sigla við ferðafólki í Suðurgrønlandi. Eisini skal báturin brúkast sum læknabátur har uppi, greiðir Lasse Klein á AWI Boats, frá.

Royndartúrin gekk Ketil 23 míl, sum hann fekk frá tveimum Perkins motorum, sum hvør hevu 265 HK. Krvið var, sigur Lasse Klein, at hann skuldi ganga í minsta lagi 19 míl. Kostnaðurin fyri bátin er knøpp hávtriðja millión krónur.

Báturin verður avskipaður við farmaskipi til Aalborg í aðru viku. Haðani verður hann so fluttur, eisini við farmaskipi, til Grønlands, og er ætlanin, at hann skal verða í Nanortalik umleið fyrsta juni.

Lasse Klein greiðir frá, at grønlendingar hava rættiliga víst áhuga fyri bátinum. Nógvir fyrispurningar eru komnir, men enn er eingin konkret avtala gjørd kortini.

Eisini í Føroyum tykist áhugi vera fyri hesum nýggja bátinum, sigur Lasse Klein. Men heldur eingin føroyingur hevur tikið nakara endaliga avgerð um at fáa sær ein slíkan.

Tað hava teir hinvegin, tá talan er um vanligu útróðrarbátarnar. Eitt nú eru tríggir AWI Star35 bátar ávegis, umframt at aðrir fyrispurningar eisini eru.

Tann stóri marknaðurin hjá AWI Boats seinnu nógvu árini hevur verið i Grønlandi. Fleiri enn 60 bátar hevur smiðjan gjørt til Grønlands, og í løtuni verður ein av teimum stóru, ein AWI 39, bátur gjørdur til Grønlands.

Lasse Klein fegnast um, at føroyski marknaðurin nú tykist vera vaknaður aftur, tí har hevur einki lív verið í eini tíggju – tólv ár, sigur hann.

Hinvegin er fyritøkan farin at gera umvælingar nú einaferð. Tær hava líkasum ligið á láni, sigur Lasse Klein, tí so nógvir nýbygningar hava verið. Men nú er gjørt av at taka umvælingarnar fram um nýbygningarnar, sigur hann

Tað arbeiða einir 20 mans hjá AWI Boats, og har er nokk at gera, letur Lasse Klein at.